# a svikin

hava goldið fleiri milliónir fyri arbeiðið.

– Vit eru mangan nevnd fyri at bara spæla við børnini.

**Baka og venja**

Ein mamma at einum tannáringi, sum gekk hjá okkum, var á fundi við Almannastovuna, fyri at fáa játtanina longda. Gentan var ávíst, tí hon var veik og hennara høgra og vinstra síða samarbeiddu ikki, so hon var m.a ikki før fyri at vinda ein lappa. Á fundinum spurdi Almannastovan, hvat gentan gjørdi, tá hon var til viðgerð. Mamman hevði greitt frá tí, sum hon visti og nevndi so, at gentan onkuntíð eisini hevði bakað smákøkur í ergoterapiuni. "Bakað," rópti sosialráðgevin, "tey skulu venja". Mamman fekk á fundinum at vita, at Almannastovan ikki vildi leingja játtanina.

– Tey høvdu ongin forstáilsi fyri, at tað at elta deigg, gevur vøddastyrki, og at rulla smákakur styrkir samarbeiði millum høgru og vinstru kropshálvu. Ergoterapeutar royna so vítt møguligt at inndraga meiningsfullar aktivitetir inn í viðgerðina, hettar gevur eisini motivatión. Ein tannáringur tímur betur at baka smákakur og fáa venjing av tí enn at flyta ein ellan annan dims úr høgru hond yvir í vinstru hond, sigur Beinta Lassen.

**Siga eitt....**

Hon hevur sjálv roynt at trýst á, hevur skrivað til Aksel. V. Johannesen, sum ongantíð svaraði aftur.

Eftir eina útvarpssending í november 2009 ringdi Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna til hennara og bedýraði, at eingin broyting fór at verða gjørd. Tað helt bara ikki, sigur Beinta Lassen.

Hon vísir annars til ein fund, har bæði landsstýrisfólkini Aksel V. Johannesen og Rósa Samuelsen umframt fleiri fulltrúar vóru við. Á hesum fundi reisti Aksel V. Johannesen spurningin, um Rósa Samuelsen ikki bara kundi flyta peningin til ergoterapi frá Almannaráðnum til Heilsumálaráðið.

– Aksel V. Johannesen segði eisini, at øll, sum sáttmálin umfataði, fóru at fáa stuðul. Tað vóru vit fegin um, tí so kundu vaksin fólk eisini fáa stuðul, men tá ið vit komu til samráðingar, gjørdi Heilsumálaráðið greitt, at eingin yvir 18 ár fór at fáa stuðul, og á samráðingarfundinum var eingin Aksel, sum mánaðir frammanundan spurdi Ergoterapeutfelagið, hvat tey søgdu til at fáa sama sáttmála sum fysioterapeutarnir. Gjørt varð eisini greitt, at eingin stuðul fór at verða veittur til sansamotoriskar venjingar, bara til fjølbrekað børn og børn við varandi sjúkum. So er tað eg spyrji: Hvussu við eitt nú teimum, sum hava ADHD? Ella teimum menningartarnaðu?

**Eingin sparing**

– At bæði Rósa og Aksel í miðlinum hava sagt, at tað ikki er talan um eina sparing, er ein løddrætt lygn. Øll tey børn, sum ikki fungera í skúlanum, orsakað av trupulleikum við sansunum, eru spard burtur. Hesi fáa onga hjálp framyvir, hvørki frá ergo ella fysioterapeuti. Her er nokk talan um umleið 50 børn um árið, og hettar hava tey bæði valt at spara burtur, hóast tey ikki vilja siga tað alment.

**Óneyðugt stríð**

– Vit halda tað eisini vera burturvið, sum Heilsumálaráðið ætlar, at ein ávísing bara skal vera fyri fimm viðgerðir, tí tað ger, at foreldrini aðru hvørja viku skulu til lækna at biðja um ávísing. Tað tykist sum, at tað verður gjørt so trupult fyri at fólk ikki skulu orka at søkja, sigur Beinta Lassen.

Hon skilir ikki, hví Heilsumálaráðið skal gera mun á fysioterapi og ergoterapi. Tørvur er á báðum, men ilt er at skilja, hví tað almenna vil rinda minni fyri ergoterapi enn fysioterapi.

Og hví er neyðugt hjá einari mammu at einum fjølbrekaðum barnið í koyristóli at renna til lækna í tíð og ótíð at biða um eina nýggja ávísing? Eitt slíkt barn verður fjølbrekað, so leingi tað livir, og fer altíð at hava tørv á viðgerð, tey skuldi sjálvsagt fingið eina langa játtan, hitt er alt ov strævið, og kostnaðarmikið at umseta. Hvør læknaváttan kostar eisini, sigur Beinta Lassen.



*Ein venjing er at blása. Tað styrkir vøddarnar í hálsinum*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Fekk heimahjálp heldur enn venjing

**Ein 14 ára gomul genta fekk í seinastu viku noktað ergoterapi. Hon kundi í staðin fáa heimahjálp**

**Randi Jacobsen**

Beinta Lassen í Ergo veit um fleiri børn og ung, sum eru komin í ringa støðu orsakað av sáttmálaloysinum.

Her er ein lagna:

Í farnu viku vóru avvarðandi at einari 14 ára gamlari gentu á fundi við Almannastovuni. Tey ynsktu, at gentan kundi fáa ergoterapeut heim til at venja reinføri. Gentan er lamin í báðum ørmum og beinum og kann ikki ganga uttan rollator. Hon hevur orsakað av lamni niðursettan førleika í báðum armum.

Nú gentan er vorðin tannáringur, er neyðugt, at reinføri er í lagi. Omman, sum er tann, sum vaskar henni nú, ynskti, at gentan kundi fáa venjing, so at hon kann klára reinførið sjálv.

Almannastovan hevði forstáilsi fyri trupulleikanum, men segði seg ikki kunna hjálpa, orsakað av vantandi sáttmála. Tey bjóðaðu familjuni ístaðin heimahjálp.

– Heimahjálp er sum orðið sigur ein hjálp og als eingin venjing, sum ikki hjálpir gentuni at verða sjálvhjálpin, sigur Beinta Lassen.

Hvussu leingi Heilsumálaráðið letur hesa gentu og onnur í líknandi støðu bíða eftir ergoterapi er óvíst.

Fundur verður aftur í morgin millum Ergoterapeutfelagið og Heilsumálaráðið.

# Børn við sansatrupulleikum

**Summi børn, sum verða stemplað fyri at vera ósosial, yvirvirkin, at hava DAMP, kontaktveik ella bara óuppdrigin hava vánaliga sansaintegrasjón, sum tað eitur á ergoterapimáli, og hetta fæst góð hjálp fyri**

**Randi Jacobsen**

Nøkur børn hava tað truplari enn onnur. Tey eru klombrut, ótrygg og tora ikki at vera við í felagsspæli. Tey kunnu blíva í øðini ella djúpt ólukkulig yvir nakað, sum onnur halda eru smáttaríir. Nøkur hava innlæringartrupulleikar, talutrupulleikar ella hava trupult við at sita still og konsentrera seg.

Summi av hesum børnum blíva stemplað fyri at vera ósosial, hyperaktiv, "DAMP-børn", kontaktveik ella bara óuppdrigin. Men í veruleikanum er tað ein einføld frágreiðing upp á teirra trupulleikar, vánalig sansaintegratión, sigur Beinta Lassen.

Umleið 10 prosent av øllum børnum líða av sansaintegratiónstrupulleikum. Hesir trupulleikar kunnu vísa seg á ymiskan hátt. Nøkur tekin kunnu vera ovurviðkvæmi fyri ljósi, ljóði ella lukti, hava ringa balansu, ørilsi ella hæddarræðslu, vilja heldur vera áskoðarar enn luttakarar i spæli, reagera ógvusligt upp á rørslu og t.d. um klæðir stramma, eru vill og óolig ella eisini afturhaldandi og still, antin halda seg burtur frá spæliplássinum ella fáa ikki nóg mikið av villu rørslunum, orka illa at sita uppreist o.a.